# Onki 5-stjørnað hotell

**Men tvey 4-stjørnað hotell eru í Føroyum, nú tíggju føroysk hotell eru vorðin góðskumett**

FERÐAVINNA
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Nú eru føroysku hotellini komin í sama bát sum hotellini kring Norðanlond. Fríggjarmorgunin fingu tíggju føroysk hotell nýggj stjørnuskelti sambært donsku Horesta góðskuskipanini fyri hotell og ráðstevnuhentleikar.

Bæði Danmark, Svøríki, Ísland og Grønland brúka hesa góðskuskipan, sum føroyingar nú hava fingið. Áður brúktu føroysku hotellini eina skotska góðskuskipan.

Einki fimmstjørnað hotell er í Føroyum sambært donsku góðskuskipanini. Tey flestu av teimum tíggju hotellunum eru trýstjørnað, meðan tvey eru tveystjørnað, og eitt hotell er eittstjørnað. Tey bæði stóru hotellini í høvuðsstaðnum eru mett at vera fýrastjørnað.

– Í Føroyum kann mann nú prógva, at tilboð eru til ferðandi, sum eru á hædd við tey tilboð, sum fáast aðrastaðni. Góðskumetingin við stjørnunum hevur styrkt um marknaðarføringina hjá hotellunum, segði Torben Kaas, klassifikatiónsstjóri í Horesta, tá hann handaði hotellunum stjørnurnar.

Miðaltalið fyri føroysku hotellini eru smáar tríggjar stjørnur. Fleiri enn hundrað ymisk viðurskifti skulu vera í lagi, um hotellið skal fáa ávíst tal av stjørnum.

Sambært Horestaskipanini merkja tríggjar stjørnur millum annað, at øll kømur hava ves og bað, umframt sjónvarp, útvarp og skriviborð. Gestirnir hava eisini atgongd til teldu við internetsambandi.

Tað eru Ferðaráð Føroya og Horesta, sum saman við Føroya Gistingarhús- og matstovufelag hava staðið fyri góðskumetingini.



Hotel Hafnia við Martin Restorff fekk fýra stjørnur



Hotel Føroyar við stjóranum Jóhannes Jensen fekk fýra stjørnur

**So góð eru tey:**

Hotel Norð ***
Runavíkar Sjómansheim * * *
Hotel Vágar * * *
Hotel Tórshavnar Sjómansheim * * *
Hotel Hafnia * * * *
Hotel Føroyar * * * *
Hotel Bládýpi HORESTA merki (onga stjørnu)
Hotel Bakkin *
Hotel Tvøroyri * *
Hotel Øravík * * *


**Putnam pútan!**

"Besta keyp 2004" sambært "Proof!" lifestyle consumer magazine



Ergo & Hjálpartól

J.C. Svabosgøta 8 • FR-100 Tórshavn
Tel 315 777 • Fax 315 772 • Fartel 215 778
Teldupost: ergo@ergo.fo • Heimasíða: www.ergo.fo


# Skjótt tíð at tekna seg til Nósabarnaprix

**Nú eru bert 10 dagar eftir, til børnini í Føroyum kunnu tekna seg til kappingina Nósabarnaprix 2004. Í ár er kappingin savnað á torginum í SMS, har trý umdanumfør og finalan verða hildin**



NÓSABARNAPRIX
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Nósabarnaprixið fer nú fyri triðju ferð av bakkastokki, og tað munnu vera sera nógv born, sum gleða seg, eins og tey hava gjørt til undanfarnu kappingarnar.

– Tað sæst týðiliga á øllum teimum fyrispurningunum sum vit dagliga fáa frá børnum, sum spent bíða eftir, nær tey kunnu byrja at tekna seg, siga Mark Joensen og James Olsen, sum skipa fyri tiltakinum.

Og nú er tíðin endiliga komin, at børnini kunnu byrja at tekna seg til kappingina. Tekningin fer fram í tíðarskeiðnum 31. august til 11. sepember.

Tá kunnu øll børn í aldrinum frá 7-14 ár tekna seg til á heimasíðuni, wwwbarnaprix.fo. Heimasíðan fer at virka frá 31. august. Á heimasíðuni eru eisini reglugerðir og kunning um hvussu kappingin ferð fram. Eisini ber til at tekna seg til á heimasíðuni hjá SMS, www.sms.fo og eitt link er eisini á heimasíðuni hjá høvuðsstuðlinum, Føroya Banka, www.foroyabanki.fo. Tað verða fleiri kappingar á nevndu heimasíðum, har tað ber til at vinna, eitt nú atgongumerkir til undanumførini og finaluna og gávukort frá Burger King, sum eins og SMS og Føroya Banki stuðla tiltakinum.

**Tikin út við lutakasti**

– Eitt sum vit hava tosað nógv um er, hvussu luttakararnir skulu veljast burturúr. Eitt nú hevði verið stuttligt um tað bar til at hava eina sokallaða »audition« har børnini skulu stilla seg upp og syngja frammanfyri einum dómarapaneli, men hetta hava vit ikki orku til sum nú er. Eisini halda vit, at tað kanska leggur eitt ov stórt trýst á børnini.

– Hinvegin halda vit, at tað er rætt at geva øllum børnum í Føroym ein møguleika at luttaka. Tí fer luttøkan fram við lutakasti, tá ið tekningarfreistin er av. Men vit fara sjálvandi at tosa eitt álvarsorð við tey børnini, sum tekna seg til kappingina og foreldur teirra, fyri at tryggja at tey eru seriøs, og at tey hava fingið loyvi frá foreldrunum, siga teir báðir.

Løgini, ið børnini hesaferð kunnu velja at synga, verða útvald løg, okkurt um 200 í tali. Tað ber til at siggja og heinta niður eitt yvirlit á áðurnevndu heimasíðum.

Hin skemtiligi Kári Sólstein, sum vit kenna frá barnasendingunum hjá Útvarpi Føroya og sendingini, Barometrinum, verður vertur á Nósabarnaprixnum í ár. Eisini verður okkurt óvænt-að undirhald á skránni.

Aftur í ár verður fløga givin út, og á henni verða nummar eitt, tvey og trý í finaluni, umframt tann besti tvey-arin í undanumfør-unum.

Nummar eitt í finaluumfarinum fær 10.000 krónur, og nummar tvey og trý fáa eitt gott gávukort frá Burger King, og okkurt gott frá høvuðsstuðlinum av Nósabarnaprix 2004, Føroya Banka.



# Nú vilja danir lurta eftir okkum




*Løgmaður sær tað sum framstig í flogvallarmálinum, at forsætisráðharrin nú er opin fyri at tosa um málið*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Líkt er til, at danir ikki eru so avvísandi í flogvallarmálinum, sum teir áður hava verið. Forsætisráðharrin vil lurta eftir og viðgera føroysku sjónarmiðini, sigur løgmaður**

FLOGVALLARMÁLIÐ
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Danir eru ikki so stívrendir, sum teir fyrr hava tókst føroyingum, tá tosað verður um flogvøllin í Vágum, sigur Jóannes Eidesgaard løgmaður. Nú vilja teir lurta eftir okkum og krevja ikki, at vit yvirtaka vøllin, sum hann liggur.

-Eg síggi framstig í, at forsætisráðharrin nú er opin fyri at tosa um flogvallarmálið, sigur løgmaður.

Jóannes Eidesgaard tók flogvallarmálið upp á ríkisfundinum í Grønlandi herfyri.

Hann vísti á yvir fyri danska forsætisráðharranum, Anders Fogh Rasmussen, at danir hava ábyrgdina av flogvølil eisini ábyrgdina av trygdini, og at vøllurin er nútíðarhóskandi.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, gjørdi danska forsætisráðharranum greitt, at tað ber ikki til at krevja, at føroyingar bara kunnu yvirtaka flogvøllin, sum hann liggur, við teirri grundgeving, at tað hevur verið danskur politikkur at sleppa statinum frá flogvallunum.

-Eg vísti á, at bæði í Danmark og í Grønlandi hevur staturin latið vallir frá sær, sum hava verið fult nútíðargjørdir. Men tað er vøllurin í Vágum ikki, vísti løgmaður á.

**Anders skilir**

Hann sigur, at tað tóktist forsætisráðharrin eisini at skilja og vilja taka upp í serligum samráðingum um flogvøllin.

-Forsætisráðharrin viðgekk, at har eru nøkur ting, sum skulu gerast, áðrenn vit fara at tosa víðari um útbyggingar, sigur Jóannes Eidesgaard.

Løgmaður sigur, at hann gjørdi forsætisráðharranum greitt, at hendan samgongan hevur ikki sum høvuðsmál at yvirtaka flogvøllin bara fyri at yvirtaka hann.

Flogvøllurin er týðandi partur av sambandi okkara við útheimin, og fyri føroyingar er hann í løtuni ein fløskuhálsur, sum má burtur. Fyri danir er hann meira at kalla ein blettur, sum teir mugu vaska av sær, tí tað er skilligt, at her liggur nakað, sum danski staturin eigur og hevur forsømt, so tað stendur eftir.

Løgmaður sigur, at hann legði dent á yvir fyri forsætisráðharranum, at tað hevði verið gott at fingið eina útbygging av flogvøllinum í gongd júst nú, útlit eru fyri lækkandi konjunkturum í samfelagnum.

Men tað ber sjálvandi ikki til at fara undir nakað sum helst, fyrr enn vit vita, hvat vit vilja við flogvøllinum, vísir hann á. Fleiri ymsar ætlanir hava verið frammi.

**Býta kostnaðin**

-Øllum tí mugu vit bíða við, til vit hava gjørt av, hvørja loysn vit velja. Og kostnaðurin verður millum 200 og 400 milliónir, líkamikið, hvat vit velja, sigur hann. Um vit vilja leingja vøllin til eitt nú 1.400 m. ella 1.800 metrar

-Og tað er ikki vist, at bara annar parturin skal bera allan kostnaðin, sigur løgmaður, sum hevur orðað við forsætisráðharran um at hyggja at eini loysn, har báðir partar bera sín lut av kostnaðinum.

Han staðfestir, at vit í øllum førum verða bundin av flogvøllinum í Vágum í nógv ár fram í tíðina, hóast vit tosa um at gera ein nýggjan flogvøll. Og vit tola ikki at liggja við einum ótíðarhóskandi vølli alla hesa tíðina.

Málið er serliga aktuelt nú, Maersk Air fer at gevast at flúgva til Føroya. Kanska er høvuðsgrund teirra ikki, at vøllurin er ov stuttur, men tað er so ein grundgeving. Atlantsflog skal væl einaferð skifta síni flogfør út. Og skal okkurt annað flogfelag byrja at flúgva til Føroya, tykist alneyðugt, at vit hava ein longri vøll. So her er einki at bíða við, sigur løgmaður, sum fer at taka málið uppaftur við forsætisráðharran sum skjótast.

Fundur er avtalaður í øðrum samanhangi um hálvan september, og tá ætlar løgmaður at fáa flogvallarmálið viðgjørt víðari, sigur hann.


**SUNNUDAGSDØGURÐI Á HOTEL NORÐ**
**saman við MC Restorff**

**Sunnudagin 22. august spælir og syngur M.C Restorff undir døgurðanum**

Matarskrá:

**Forrættur:**
Fesk súpan við flutes

**Høvuðsrættur:**
Heilstokt oksafilet v/eplabátum og hvítum eplum, grønsaks sauthé, gularótum og sós

**Dessert:**
Stór kakubuffet við kaffi

**Kostnaður: 175,-**

**Ring og bílegg borð á tel 45 12 44**



Hotel Norð

WWW.HOTELNORD.FO • TEL 45 12 44